Almannamálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	02. november 2020
Mál nr.:	20/00839
Málsviðgjørt:	PL
Eftirkannað:	06.oktober 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur
(Heimild at leggja tilmæli fyri tvingsilsnevnd um tryggjaðar búfyrskipanir til persón, ið er dømdur sambært § 74 a í revsilógini og heimild til tvingsilsnevndina at áseta gildistíð fyri tryggjaðar búfyriskipanir)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur
(Heimild at leggja tilmæli fyri tvingsilsnevnd um tryggjaðar búfyrskipanir til persón, ið er dømdur sambært § 74 a í revsilógini og heimild til tvingsilsnevndina at áseta gildistíð fyri tryggjaðar búfyriskipanir)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 51, stk. 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:
"1) Almannaverkið sambært dómi ella rættarúrskurði skal veita bústað sambært § 49, stk. 1, nr. 1-3 og § 49, stk. 2,"

2. Í § 51 verður aftan á stk. 2 sum nýggj stk. sett:
"*Stk. 3*. Gildistíðin fyri tryggjaða búfyriskipan kann í mesta lagi verða 6 mánaðir hvørja ferð.
Stk. 4. Hóast gildistíðina í stk. 3 skulu myndugleikin og leiðslan støðugt meta um ítøkiliga tørvin á inntrivinum, ið góðkenningin er grundað á, og tillaga ella steðga inntrivinum, um inntrivið ikki longur er neyðugt.
Stk. 5. Er gildistíð ásett í dómi ella rættarúrskurði, er henda galdandi hóast ásetingina í stk. 3.
Stk. 6. Gildistíðin fyri tryggjaða búfyriskipan til ung, ið eru dømd sambært § 74 a í revsilógini, skal samanlagt ikki vara longur enn 12 mánaðir. Er talan um uppihald á tryggjaðari búfyriskipan saman við uppihaldi á vardum bústaði, er gildistíðin í mesta lagi 18 mánaðir samanlagt."
Stk. 3 og 4 verða eftir hetta stk. 7 og 8.

3. Í § 51, stk. 4, sum verður stk. 8, verður "gildistíð," strikað.

4. § 52 verður orðað soleiðis:
"**§ 52**. Skal persónur setast á fyribils ella vardan bústað í Føroyum ella í øðrum parti av ríkinum sambært § 49, stk. 1, nr. 1-3 ella § 49, stk. 2, og setir persónur seg ímóti hesum, veitir løgreglan eftir áheitan frá Almannaverkinum hjálp at flyta persónin á bústaðin."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Sambært løgtingslógini kann Almannaverkið leggja tilmæli fyri tvingsilsnevndina um at veita persóni tryggjaða búfyriskipan, tá treytirnar í § 51, stk. 1 eru loknar. Av misgáum er § 49, stk. 2, sum ásetur, at Almannaverkið hevur skyldu at veita sosialnámsfrøðiliga viðgerð og fyribils bústað ella vardan bústað til persónar, ið eru dømdir sambært § 74 a í revsilógini (vanliga nevnt ungdomssanktion), ikki nevnd í § 51, stk. 1 sum ein bólkur, sum kann fáa bústaðin skipaðan sum tryggjaða búfyriskipan, og verður hetta nú rættað.

Í § 51, stk. 4 í lógini er heimild at áseta m.a. gildistíð fyri tryggjaða búfyriskipan í kunngerð. Tryggjað búfyriskipan er eitt sera týðandi inntriv í sjálvsavgerðarrættin, og mett verður rættast, at gildistíðin á hesum inntrivi er ásett í lóg heldur enn kunngerð. Tí verður nýggj áseting gjørd í § 51, sum ásetur gildistíðina, samstundis sum heimildin at áseta gildistíð í kunngerð verður strikað.

Sambært § 52 í løgtingslógini kann Almannaverkið heita á løgregluna um at hjálpa til við at fáa persón settan á fyribils ella vardan bústað í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum, um viðkomandi persónur setur seg ímóti hesum. Ásetingin verður rættað til, soleiðis at løgreglan fær somu heimild í mun til persónar, ið eru dømdir sambært § 74 a í revsilógini.

1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóggáva ásetur treytirnar fyri, nær Almannaverkið kann leggja tilmæli fyri tvingsilsnevndina um at ein bústaður, sum Almannaverkið hevur skyldu at veita ávísum persónum, kann skipast sum ein tryggjað búfyriskipan.

Eisini ásetur galdandi lóggáva, at gildistíð fyri tryggjaðar búfyriskipanir verður ásett í kunngerð.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at gera greitt, at bústaðir til persónar, ið eru dømdir sambært § 74 a í revsilógini, eisini kunnu skipast sum tryggjaðar búfyriskipanir, eins og at gildistíð fyri tryggjaðar búfyriskipanir verður ásett í lóg heldur enn kunngerð.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at gera greitt, at Almannaverkið kann leggja tilmæli fyri tvingsilsnevndina um at bústaðir til persónar, ið eru dømdir sambært § 74 a í revsilógini (vanliga nevnt ungdomssanktion), eisini kunnu skipast sum tryggjaðar búfyriskipanir, eins og at gildistíð fyri tryggjaðar búfyriskipanir verður ásett í lógini heldur enn í kunngerð orsakað av at talan er um týðandi inntriv í sjálvsavgerðarrættin.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis orsakað av, at talan lutvíst er um eina lógartekniska broyting (manglandi heimild hjá Almannaverkinum at leggja tilmæli fyri tvingsilsnevndina um at skipa bústað sum tryggjaða búfyriskipan) og at avgerðin um at flyta heimildina at áseta

gildistíð í lögina heldur enn í kunngerð ikki hevur við sær broyting í mun til galdandi rættarstøðu.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur sum avleiðing fyri teir persónar, ið eru dømdir sambært § 74 a í revsilógini, at bústaðirnir, ið Almannaverkið sambært lógini hevur skyldu at veita hesum persónum, eisini kunnu skipast sum tryggjaðar búfyriskipanir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið sampakkar við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.
Lógaruppskotið ger inntriv í rættindi hjá børnum og ungum við tað, at bústaðir kunnu skipast sum tryggjaðar búfyriskipanir, og harvið alt ella nærum alt samdøgrið hava læstar úthurðar og læst vindeygu. Inntrivið er neyðugt við tað, at talan kann verða um treyt, ið framgongur av dómi ella rættarúrskurði, ella at viðurskiftini gera tað neyðugt at skipa bústaðin sum tryggjað búfyriskipan, harundir orsakað av vanda fyri at persónur ger skaða á seg sjálvan ella onnur.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Nr. 1
Ásett verður, at tilmæli kann leggjast fyri tvingsilsnevndina um, at bústaðir, sum Almannaverkið hevur skyldu at veita sambært §§ 45 og 46 til persónar, sum eru dømdir sambært § 74 a í revsilógini, eisini kunnu skipast sum tryggjaðar búfyriskipanir.

Samstundis verður § 51, stk. 1 rættað til við at orðið "vardan" verður strikað, soleiðis at ongin ivi er um, at bæði fyribils og vardir bústaðir sambært ávikavist § 45 og § 46 í løgtingslógini kunnu skipast sum tryggjaðar búfyriskipanir.

Nr. 2
Ásett verður heimild til tvingsilsnevndina at áseta ávísa gildistíð, tá bústaður sambært lógini verður skipaður sum tryggjað búfyriskipan. Gildistíðin kann í mesta lagi vera 6 mánaðir hvørja ferð.

Mett verður, at eitt ovara mark fyri gildistíð uppá 6 mánaðir er ein passandi tíðarkarmur, sum ikki er ov stuttur og heldur ikki ov drúgvur. Havast skal í huga, at tryggjað búfyriskipan er eitt sera víttfevnandi inntriv í sjálvsavgerðarrættin, og hetta eigur at endurspeglast í tíðarskeiðinum, sum fyriskipanin kann vera í gildi. Tvingsilsnevndin hevur møguleika at áseta eina styttri gildistíð enn 6 mánaðir. Ásetingin hevur einans eitt ovara mark. Nevndin ásetir gildistíðina við støði í metta tíðarkarminum, ið myndugleikin hevur upplýst í tilmælinum. Verður mett, at neyðugt er at leingja tryggjaðu búfyriskipanina, ber til at leggja nýtt tilmæli fyri tvingsilsnevndina. Heimildin í tvingsilslógini at læsa býli um náttina hjá persónum, ið búgva í bútilboði, og eru fevndir av § 49 í lóg um almannatrygd og tænastur – sami málbólkur – hevur eisini gildistíð á í mesta lagi 6 mánaðir hvørja ferð.

Ásett verður harumframt, at hóast gildistíðina, so skulu myndugleikin og leiðslan støðugt meta um ítøkiliga tørvin á inntrivinum og tillaga ella steðga inntrivinum, um inntrivið ikki longur er neyðugt. Hetta kann hava við sær, at fyriskipanin heldur uppat, áðrenn gildistíðin er úti. Hetta er tó ikki galdandi, tá gildistíðin er ásett í dómi ella rættarúrskurði.

Gildistíðin fyri tryggjaðu búfyriskipanina kann framganga av dómi ella rættarúrskurði, og í teimum førum tekur tvingsilsnevndin ikki avgerð um aðra gildistíð. Verður fyriskipanin longd aftaná, at gildistíðin sambært dóminum ella rættarúrskurðinum er úti, tekur tvingsilsnevndin tó avgerð um gildistíð sambært ásetingini í stk. 3.

Sambært § 74 a í revsilógini, so kann persónur undir 18 ár ikki verða í búfyriskipan longur enn samanlagt 1 ár og 6 mánaðir, av hesum í mesta lagi samanlagt 12 mánaðir í tryggjaðari búfyriskipan. Hetta verður endurtikið í § 51, soleiðis at ongin ivi er um gildistíðina fyri henda málbólk.

Nr. 3
Heimildin at áseta gildistíð í kunngerð verður strikað. Mett verður, at gildistíð á so týðandi inntrivi í sjálvsavgerðarrættin eigur at vera ásett í lóg heldur enn kunngerð.

Nr. 4
Sambært § 52 í løgtingslógini kann Almannaverkið heita á løgregluna um at hjálpa til við at fáa persón settan á fyribils ella vardan bústað í Føroyum ella øðrum parti av ríkinum, um viðkomandi persónur setur seg ímóti hesum. Ásetingin verður rættað til, soleiðis at løgreglan fær somu heimild í mun til persónar, ið eru dømdir sambært § 74 a í revsilógini.

Til § 2
Gildiskoma.

Almannamálaráðið, 02. november 2020

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur